Felagslívstrygging fyri limir í Føroya Fiskimannafelag



Galdandi frá 1. januar 2026

# Felagslívstrygging fyri limirnar

**Fiskimannafelagið hevur gjørt avtalu við Alka um felagslívstrygging fyri limirnar**

FØROYA FISKIMANNAFELAG

alka



**Hvør er fevndur av lívstryggingini?**
Tryggingin er kravd fyri limir felagsins, um teir eru mynstraðir og ikki fyltir 70 ár.

**Nær og hvussu leingi ert tú fevnd/ur av tryggingini?**
Tú ert fevnd/ur av tryggingini, tá ið tú mynstrar og so leingi tú ert mynstrað/ur.

Um tú mynstrar av, so ert tú framvegis fevnd/ur av tryggingini í 180 dagar eftir, at tú hevur mynstrað av.



# Tryggingarupphæddir

**Skipanin fevnir um hesar upphæddir:**

*Galdandi frá 1. januar 2026*

| Skipanin fevnir um | Upphædd |
|---|---|
| Um limur doyr | 500.000 kr. |
| Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr | 250.000 kr. |
| Um limur fær hættisliga sjúku | 100.000 kr. |
| Um barn hjá limi fær hættisliga sjúku | 100.000 kr. |
| Lokaupphædd | 100.000 kr. |

Lokaupphæddin verður ásett hvørt ár eftir avtalu millum felagið og Alka.

---

# Hvat fevnir tryggingin um?

**Útgjald við deyða**
Doyr limur, áðrenn hann er 70 ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin.

**Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr**
Um hjúnafelagi ella sambúgvi doyr, áðrenn hann ella hon er 70 ár, verður hjúnalagsupphæddin útgoldin. Er talan um sambúgva, er treytin tann, at tit tvey tey síðstu árini undan deyða sambúgvans hava livað sum hjún á felags bústaði, skrásettur hjá Fólkayvirlitinum.



**Ávísar hættisligar sjúkur**

Um tú fært hættisliga sjúku, áðrenn tú ert 70 ár, so verður trygging útgoldin, um ein av niðanfyri nevndu sjúkum verður staðfest:

- Illkynjað krabbameinssjúka
- Missur av sjónini
- Blóðtøppur í hjartanum
- Missur av hoyrnini
- Hjartaloku-skurðviðgerð
- Parkinsons sjúka – Paralysis agitans
- Heilabløðing/slag
- Creutzfeldt-Jacob sjúka
- AIDS (eyðkvæmi)
- Vøddasvinn
- Nýrasvíkur
- Meningitis
- Disseminerað sklerosa
- Aorta-sjúka
- Ávísir góðkynjaðir vøkstir í heila ella mønu
- Bjølgar á lívæðrum í heilanum
- Flutningur av stórum lívgøgnum (hjarta, hjarta/lunga, lunga og livur)
- ALS (amyotrofisk lateral-sklerosa)
- Ballónvíðkan av kranslívæðrum í hjartanum
- HIV-ígerð (íkomin av blóðflutningi ella í sambandi við arbeiði)



- By-pass skurðviðgerð (koronar-sklerosa)
- Varandi hjartasvíkur
- Innsetan av ICD-eind (hjarta-kvikli) í sambandi við lívshóttandi hjartarytmuólag
- Avleiðingar av Borrealis-ígerð ella Tick Borne Encephallitis (TBE)
- Alzheimers sjúka (AD) og frontotemporalt minnissvinn
- Størri brunasár, frostsár ella etsan

Við útgjald fevnir tryggingin ikki, um limur *aftur* fær ávísa hættisliga sjúku.

### Barnatrygging í sambandi við hættisligar sjúkur

Tryggingarupphæddin verður útgoldin, um so er, at barn hjá limi (barnið skal vera minst 6 mánaðir, men ikki hava fylt 18 ár) fær staðfest eina av niðanfyri nevndu hættisligu sjúkum:

- Meningitis
- Illkynjaða krabbameinssjúku
- Nýrasvík
- HIV-ígerð íkomin av blóðflutningi
- AIDS
- Miss av sjónini (í hesum føri skal barnið tó vera minst tvey ár)
- Miss av hoyrnini (í hesum føri skal barnið tó vera minst tvey ára gamalt)

Tá ið tryggingarupphædd er útgoldin, so fellur tryggingin av viðkomandi barni burtur.

### Hesi børn hjá limum eru fevnd av tryggingini:

- Biologisk børn
- Ættleidd børn
- Fosturbørn, sum eru skrásett at búgva á sama fólkayvirlitsbústaði sum limurin

### Undantøk frá reglunum um hættisligar sjúkur og barnatrygging í sambandi við hættisligar sjúkur

Um ein limur ella barn hjá limi áðrenn upptøku í lívstryggingarskipanina hevur fingið staðfest hættisliga sjúku, so er hendan sjúkan og møguligar seinni samsvarandi sjúkur ikki fevndar av tryggingini. Ein áður staðfest sjúka kann eisini merkja, at ein ella fleiri aðrar sjúkur ikki koma undir tryggingina.

### Serregla viðvíkjandi krabbameini

Um limur ella barn hjá limi áður hevur fingið staðfest krabbameinssjúku, so er ein møgulig seinni staðfest krabbameinssjúka ikki fevnd av tryggingini, uttan mun til hvat slag av krabbameinssjúku talan er um. Tó er skipanin tann, at um tað eru liðin minst 7 ár síðani viðgerðin er endað uttan nakað afturfall ella krabbasjúkuviðgerð, so er ein nýggj krabbameinssjúka fevnd av tryggingini.

## Lokaupphædd

Tá ið tú verður 67 ár, hevur tú rætt til eina sonevnda lokaupphædd, um tú hevur verið limur í felagnum samanhangandi tey seinastu 10 árini. Um so er, at lokaupphæddin verður útgoldin, so verður hon mótroknað í møguligari seinni útgjalding av tryggingarpeningi í sambandi við deyða. Tað er sera umráðandi at boða frá rættstundis fyri at fáa lokaupphæddina – les meira um freistina á næstaftastu síðu.

## Hvør fær tryggingarupphæddina útgoldna?

Um tú ikki hevur sent Alka skjal um serliga njótunartilskilan, so verður tryggingarupphæddin í samband við deyða útgoldin eftir niðanfyri uppsettu raðfylgju:

**1. Hjúnafelagi/skrásettur partnari**
**2. Sambúgvi**
Treyt fyri at verða góðkendur sum sambúgvi:
a) Antin at limurin og sambúgvin hava sama bústað og skulu hava, hava ella hava havt barn saman
b) Ella at limurin og sambúgvin hava livað saman sum hjún á felags bústaði í minst tvey ár áðrenn andlátið
**3. Lívsarvingar**
Frágreiðing: Lívsarvingar eru børn, barnabørn og langommu- og langabbabørn
**4. Tey, ið eru nevnd í testamenti**
**5. Sambært arvalógini**

Vilt tú, at tryggingarupphæddin (eisini) skal útgjaldast til onnur ella skal býtast millum fleiri persónar, so skalt tú gera vart við tað hjá Alka í serligum skjali – les partin “Serligur njótanar-tilskilaður”.

Tryggingarupphæddin verður útgoldin uttan um deyðsbúgvið. Hetta vil siga, at møguligir kravánarar (kreditorar) hjá tær ikki kunnu krevja at fáa lut í peninginum.

Um tú ikki hevur arvingar sambært arvalógini, ikki hevur skrivað testamenti og ikki hevur sett nakran í serstaka njótunartilskilan til Alka, so verður einki útgoldið.



Tryggingarupphædd í sambandi við deyð hjá maka, tryggingarupphædd í samband við hættisliga sjúku, tryggingarupphædd hjá børnum í samband við hættisliga sjúku og lokaupphædd verða útgoldnar til limin sjálvan.

## Serlig njótunartilskilan

Ynskir tú at broyta mannagongdina við útgjalding til næstu avvarðandi, so kanst tú fáa eitt skjal, sum viðvíkur serligari njótunarskilan. Ein njótunartilskilan er eitt skjal, har tú tilskilar, hvør skal fáa eitt møguligt útgjald frá tínari trygging. Tú kanst seta seta einhvønn, tú ynskir, sum njótunarskilaðan í tryggingini.

Ynskir tú t.d., at sambúgvi tín skal hava útgjaldingina, hóast viðkomandi ikki lýkur treytirnar fyri at verða roknað/ur sum



næsti avvarðandi, so skalt tú senda eina njótunartilskilan til Alka.

**Gev gætur:** Sjálvt um tú hevur sett ein serstakan njótunartilskilaðan, og hjúnafelagi og/ella lívsarvingar eru eftir teg (børn, barnabørn og teirra børn), so kunnu tey mótmæla ásetingini um njótanartilskilan. Hetta merkir, at útgjaldið til tann njótunartilskilaða verður lækkað í tann mun, tey mótmælandi fáa viðhald.

Hevur tú sent eina njótunartilskilan til Alka, so kanst tú altíð broyta hana aftur.

### Fráboðan og útgjald

Áheitan um útgjald av tryggingarupphæddum skal skjótast gjørligt latast fiskimannafelagnum (sí nærri um hetta í tryggingartreytunum, sum tú finnur á heimasíðuni www.fiskimannafelag.fo). Eitt oyðublað skal fyllast út (har verður eisini upplýst, hvørji skjalprógv skulu leggjast við oyðublaðnum).

Fiskimannafelagið sendir oyðublaðið til Alka. Tryggingarupphæddin verður sum meginregla goldin umvegis felagið.

### Skattaviðurskifti

Tryggingargjald til tryggingina kann ikki dragast frá í skatti. Eitt útgjald frá tryggingini er undantikið inntøkuskatti og avgjaldi til tað almenna. Av útgjøldum við deyða skal møguliga gjaldast arvaavgjald sambært føroyska lóg um hetta.

### Kærumøguleikar

Er ósemja um tryggingina ella um fráboðaðum skaða, so kann kærast til:

### Ankenævnet for Forsikring

Anker Heegaards Gade 2
1571 København V.
Telefon +45 33 15 89 00 – millum kl. 10.00 og 13.00.
Ætlar tú tær at kæra, so skal serstakt oyðublað fyllast út. Tað fæst hjá Ankenævnet, Alka, Forbrugerrådet, Føroya Fiskimannafelag ella Forsikringsoplysningen.

### Alment

Krav um lokaupphædd fellur burtur, um tað ikki er fráboðað Alka

- áðrenn deyða ella
- í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at tú ert farin úr felagnum, ella
- í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at avtalan millum felagið og Alka møguliga er hildin uppat

Henda kunning ein stuttur samandráttur av felagslívstryggingaravtaluni og tryggingartreyt-unum. Kunningin er galdandi frá 1. januar 2025. Nágreiniligu treytirnar eru tær til eina og hvørja tíð galdandi avtalurnar og tryggingartreytirnar (sí www.fiskimannafelag.fo).



**Føroya Fiskimannafelag**
Bryggjubakki 14
100 Tórshavn
Telefon +298 31 15 69
info@fiskimannafelag.fo
fiskimannafelag.fo

**Alka Forsikring**
Klausdalsbrovej 601
2750 Ballerup
Telefon +45 70 12 14 16
alka@alka.dk
alka.dk